Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um viðurskiftini hjá fangum, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørji ítøkilig sálarheilsutilboð standa fólki í boði eftir leyslating úr eini varðhaldsfongsling?
2. Hvussu vil løgmaður tryggja, at fangar, ið verða sendir til Danmarkar at sita dóm ella í varðhaldi, fáa sama rætt til telefoniskt samband við avvarðandi, sum hesi høvdu fingið, sótu tey í Føroyum?

Viðmerkingar:
Fyrr í ár hoyrdist, at neyðugt hevur verið at senda føroyskar fangar til Danmarkar at sita í varðhaldi, tí varðhaldið í Mjørkadali er fult.[1] Ofta verður ført fram, at tað at senda fólk av landinum at sita ein dóm, kennist sum ein tvífald revsing, tí hesi verða avskorin frá familju og avvarðandi sum heild, og at hetta er sálarliga hart fyri bæði fanga og tey avvarðandi. Harafturat er tað ofta serliga tvørligt hjá avvarðandi at fáa samband við tann innsetta, situr viðkomandi í Danmark. Tískil er tað ofta neyðugt, at hesi fáa bjóðað serliga sálarliga kreppuhjálp, tá tey koma út aftur.

Undirritaði vil vita, um arbeitt verður við at tryggja, at sambandið millum fanga og avvarðandi verður varðveitt, tá neyðugt hevur verið at senda fólk til Danmarkar. Umframt hetta vil undirritaði eisini vita, hvørji sálarheilsutilboð standa fangum (herundir eisini varðhaldsfangum) í boði, sum ein liður í at innslúsa fólk aftur í føroyska samfelagið, eftir at tey eru flutt av landinum at sita ein dóm ella í varðhaldi.

Á Løgtingi, 10. mars 2021

Djóni Nolsøe Joensen

[1] http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/01/25/neyugt-flyta-varhaldsfangar-av-landinum